

## Samkynd savnast í Keypmannahavn

Leygardagin og eina viku fram hittast umleiða 5500 samkynd fólk úr øllum heiminum í Keypmannahavn. Worldoutgames nevnist stevnan, ið verður rópt homo-OL. Worldoutgames varð fyrstu ferð hildin í 2006 í Montreal í Kanada. Evnið á stevnuni í ár er viðurskiftini hjá teimum samkyndu og ikki minst vantandi rættindi teirra í fleiri londum. Av ótta fyri álopum hava fleiri luttakarar valt at luttaka í tí dulda. Danmark ætlar at taka í egnan barm og ikki bara finnast at øðrum londum, tá ið tað ræður um viðurskiftini hjá teimum samkyndu.

# G!-streingja renning

**Hvat gert tú, tá lógardeildin á politistøðini í Havn fortelur tær, at ein avdankað lóg um "utugt i det almenne rum" forðar tær at skipa fyri eini nakinrenni-kapping á G! Festivalinum? Tú skipar sjálvandi fyri einari G-streingja rennikapping!**

TÍÐINDASKRIV

Tá umboð fyri mess.fo vóru á Roskilde Festivalinum fyrr í mánaðinum, fylgdu tey unga havnamanninum Jóhan Hofgaard, ið so gjarna vildi sleppa við í nakinrenningina, sum DR1 árliga skipar fyri. Tíverri var Jóhan ov seinur at melda seg til, so umboðini fyri MESS avgjørdu sjálvi at skipa fyri einari nakinrenni-kapping, har vinningurin var ein ølkassi og ein stráhattur.

- Videobrotið, ið bleiv tikið av nakinrenningini hjá MESS, varð so væl móttikið av brúkarunum á mess.fo, at vit avgjørdu at halda eina líknandi rennikapping aftur í Føroyum – hesa ferð á G! Festivalinum, sigur Búi Rouch frá Mess, ein av persónunum handan kappingin.

### Tuskandi naknar rumpur á Gøtusandi

Leygarkvøldið, tá Teitur hevur framført á stóra pallinum, verður G!-Streingja rennikappingin á Gøtusandi, har tey vóna at síggja nógvar berar rumpur. Tað er pláss fyri 16 luttakarum - 8 dreingjum og 8 gentum. Einasta treytin, sum er, at tú ert í G!-Stronginum, sum verða útvegaðir á staðnum, sigur Sunneva Háberg Eysturstein í tíðindaskrivi.



*Havnarmaðurin Jóhan Hofgaard rann nakin á Roskilde Festivalinum fyrr í mánaðinum. Á G! verður hálvnakinrenning, tí loyvt er ikki at renna nakin*






# Norðurlendsk javnstøðuráðstevna í Reykjavík

**18-19. november verður stór norðurlendsk javnstøðuráðstevna í Reykjavík. Evnið er kyn og vald.**

JAVNSTØÐA

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



Norðurlond eru heimsmeistarar í javnstøðu í politikki, men í vinnulívinum stendur framvegis illa til við javnstøðuni. Hví gongur tað seinni í vinnulívinum enn í politikkinum? Henda spurning fer ráðstevnan í Reykjavík at viðgera nærri.

Ráðstevnan er ókeypis, men luttakararnir mugu sjálvir gjalda fyri ferð og uppihald. NGOarar, ungfólk og onnur kunnu tó søkja um stuðul verður sagt á heimasíðuni www.javnratt.fo.